# ítróttur

Nr. 131 • týsdagur • 13. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


## Martin Christensen uppsagdur í HB

**Danski miðvallarin hjá HB, Martin Christensen, sum í fjør taldist millum teir stinnastu hjá gullvinnarunum, er nú uppsagdur í havnarfelagnum**

UPPSØGN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

HB hevur sagt sáttmálan við danska miðvallaran hjá sær, Martin Christensen, upp. Stjórin í Havnar Fótbóltur, Steinfinn Mittelstein, sigur, at avtalan millum HB og Martin Christensen er uppsøgd, tí at felagið ikki metur, at danin hevur gjøgnumført sáttmálan.

**Kom skaddur til Føroya**

Steinfinn Mittelstein hevur ikki tær stóru viðmerkingarnar til málið, men hann viðgongur tó, at høvuðsorsøkin til at Martin er uppsagdur, er tann, at danin ikki var frískur, tá ið hann kom aftur til Føroya í vetur.

– Støðan er tann, at avtalan hjá Martin er uppsøgd, og løgfrøðingurin hjá okkum tekur sær av málinum víðari, sigur Steinfinn Mittelstein.

Martin Christensen hevur ikki verið nógv at sæð á besta liðnum hjá HB í hesum kappingarárinum, millum annað tí at hann hevur verið nógv darvaður av skaða. Í fjør taldist danin millum grundstuðlarnar á HB-liðnum, sum vann føroyameistaraheitið, og sum skilst trívast Martin og unnustan Sabine stak væl í Føroyum, so ikki er óhugsandi, at danski miðvallarin verður at síggja á onkrum øðrum føroyskum liði í næstum. Sjálvur vil Martin Christensen ikki gera nakrar viðmerkingar til málið enn.



*Danski miðvallarin hjá HB, Martin Christensen, sum her er avmyndaður í dysti ímóti B36 í fjør, er nú uppsagdur av føroyameistarunum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Vita einki um mótstøðuliðið

**Mikudagin skal HB leika fyrsta Champion League undandystin ímóti georgiska FC Wit á útivølli. Venjarin hjá føroyameistarunum, Heine Fernandez, sigur, at teir vita einki um georgiska liðið**

CHAMPIONS LEAGUE
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Leikandi venjarin hjá HB, Heine Fernandez, veit einki um mótstøðuliðið í Champions League undandystinum, georgiska FC Wit, sum verður í Georgia í annaðkvøld.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er uttan iva ein trupul uppgáva, ið stendur fyri framman hjá HB, nú teir í annaðkvøld skulu spæla Champions League dyst á útivølli í Georgia. Havnarfelagið hevur áður roynt seg í júst Georgia, og tað er ikki nakað, ið teir minnast gleðiliga aftur á. Tá var leikt í 35 hitastigum, og HB tapti heili 0-6 fyri Dinamo Batumi, sum mótstøðuliðið tá kallaðist. Heimadystin á Svangaskarði vann Batumi 3-0, so lítið man verða at ivast í, at georgisku liðini eru sterk. Í hópinum hjá HB í Georgia eru bert tveir leikarar, sum eisini vóru við, tá ið felagið kappaðist við Dinamo Batumi í 1997. Tað eru teir báðir, liðskiparin Rúni Nolsøe og veteranurin Hallur Danielsen. Harumframt vóru Bárður Johannesen og Hans á Lag eisini við í teimum báðum dystunum, men teir eru ikki við á HB-liðnum í løtuni vegna drúgvan skaðar.

**FC Wit bert nummar fýra**

Sambært teimum upplýsingum, ið HB hevur fingið fatur á, endaði mótstøðuliðið í ár, FC Wit, bert á fjórða pláss í heimligu kappingini í Georgia. Venjarin hjá HB, Heine Fernandez, sigur, at teir hava frætt, at FC Wit er sloppið at umboða Georgia í Champions League, hóast liðið bert gjørdist nummar fýra í georgisku kappingini. Orsøkin til tess er, at so nógv feløg í Georgia hava verið blandað upp í ymiskar muturgølur, og harafturat hava nógv feløg ógvuliga ivasom fíggjarlig viðurskiftir. Tískil avgjørdi georgiska fótbóltssambandið, at FC Wit, ið ikki hevur verið í slíkum gølum, sum hevur skil á sínum fíggjarligu viðurskiftum, skuldi sleppa at royna seg í Champions League undandysti.

**Verjukend útgangsstøða**

Hópurin hjá HB fór til Danmarkar hósdagin, og hesar seinastu dagarnar hevur liðið verið á venjingarlegu nærheindis Keypmannahavn. Í telefonini úr Keypmannahavn sigur Heine Fernandez, at liðið hevur vant fimm ferðir í Danmark á vøllunum hjá gamla felagnum hjá Fernandez, AB, norðan fyri Keypmannahavn. Allir spælararnir tykjast verða væl fyri, hóast miðvallarin Kári Nielsen, sum veruliga hevur fingið sítt gjøgnumbrot í ár, hevur havt trupulleikar við øðrum fótinum. HB noyðist eisini at verða landsliðsleikaran, Rógva Jacobsen, fyriuttan til dystirnar ímóti georgiska liðnum, tí at hann í seinna Europa Cup dystin ímóti FC Kaunas úr Litava fekk reyða kortið, og seinni var dømdur tríggja dagar leikbann av UEFA.

Leikandi venjarin hjá HB sigur, at tað uttan iva verður ein ógvuliga trupul dystur í Georgia, og tað er ein trupulleiki, at man als einki veit um sjálvt liðið hjá FC Wit.

– Vit vita ikki, hvørja leikskipan FC Wit nýtir, og tað er ein bági, tá ið vit nú skulu leggja okkara taktikk til dystin, sigur Heine Fernandez. Hann dylur tó ikki fyri, at HB fer at hava ein rættuliga verjukenda útgangsstøðu í dystinum mikukvøldið, sum vónandi kann geva eitt gott úrslit, soleiðis at alt framvegis er opið undan dystinum í Føroyum. Sjálvur hevur Heine Fernandez áður spælt Champions League undandystir ímóti georgiskum lið, tá ið hann leikti saman við Toda Jónsson í FC Keypmannahavn. Hetta var í 2001, og Heine Fernandez minnist frá teimum dystunum, at georgiska liðið var tekniskt gott og sterkt á heimavølli. Dysturin mikukvøldið í Georgia verður leiktur kl. 18 lokala tíð, og er tað kl. 15 føroyska tíð.



## Todi ikki í hópinum hjá FCK

**Sunnudagin leiktu donsku meistararnir úr FC Keypmannahavn venjingardyst ímóti týska liðnum Hamburger SV, men Todi Jónsson var ikki í hópinum hjá FCK til dystin**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fyrsti venjingardysturin hjá donsku greipuvinnarunum úr FC Keypmannahavn aftaná vitjanina í Føroyum var leiktur sunnudagin ímóti týska Hamburger SV. Danska liðið tapti dystin 0-1, men tað var uttan Toda Jónsson á liðnum, tí Todi bleiv ikki úttikin til dystin.

**Misnøgdir við Føroyavitjanina**

Sum tey flestu óivað vita, hevur liðskiparin hjá FC Keypmannahavn, Bo Svensson, alment borið fram, at leikararnir hjá FCK vóru ónøgdir við vitjanina í Føroyum. Bo Svensson hevur við danskar fjølmiðlar sagt, at tað ikki er optimalt at venja og spæla á graslíki stutt undan, at kappingin í superliguni fer í gongd. Eisini verður funnist at, at tað er so kalt í Føroyum, og at tað ávirkaði innsastsin hjá donsku leikarunum á vitjanini í Føroyum. Formaðurin í danska felagnum, Flemming Østergaard ella Don Ø, sum hann eisini verður róptur, sigur, at spælararnir hava einki at grenja um, tí teir skulu bara tiga og gera tað, sum teir fáa løn fyri, og tað er at spæla fótbólt.

Todi Jónsson skrivar á heimasíðu síni, at hann ikki skilur atfinningarnar frá spælarunum, tí teir vandu bert tvær ferðir á graslíki í Føroyum, umframt at teir leiktu í Klaksvík ímóti KÍ á graslíki. Somuleiðis sigur Todi Jónsson, at leiðslan í felagnum var stak væl nøgd við ferðina her á landi. At veðrið ikki var til vildar, er sum so einki at gera við, skrivar Todi Jónsson á heimasíðuni hjá sær.



*Todi Jónsson var ikki úttikin til venjingardystin hjá FCK ímóti týska Hamburger SV í vikuskiftinum*
*Savnsmynd*

## Kappingarneyti til føroyingarnir í Fremad Amager

**Í farnu viku skrivaði Fremad Amager sáttmála við Kenny Thorup, og harvið fingu teir tríggir føroyingarnir Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum og Hjalgrím Elttør ein nýggjan kappingarneyta**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kenny Thorup er royndur spælari, ið kann leika bæði á miðvøllinum og í álopinum, og tað er júst á hesum plássum, at teir tríggir føroyingarnir royna seg. Hóast Kenny Thorup einans er 26 ára gamal, so er hann ein ógvuliga royndur leikari, ið hevur verið í nógvum feløgum.

**Aftur til barndómsfelagið**

Kenny Thorup er uppvaksin í Fremad Amager, men í heilt ungum aldri gekk leiðin til FC Keypmannahavn. Her fekk Thorup ongantíð av álvara gjørt vart við seg, og leiðin gekk tí víðari til Næstved og Hvidovre. Her gekk betur, og tí fekk superligafelagið AGF eyguni upp fyri Thorup, sum flutti til Århus, har hann hevði nøkur góð ár. Síðani gekk leiðin aftur til Keypmannahavnar, har Thorup leikti í AB, saman við eitt nú HB-venjaranum Heina Fernandez, og tað er úr hesum felag, at Kenny Thorup nú vendir aftur til barndómsfelag sítt Fremad Amager.

Leikararnir í Fremad Amager eru farnir undir venjingina aftur, og mikukvøldið leika teir fyrsta venjingardystin, sum verður ímóti gamla felagnum hjá Henrik Larsen, landsliðsvenjara, Ølstykke á útivølli.

## Jón Rói komin í gongd

**Føroyski landsliðsleikarin í fótbólti Jón Rói Jacobsen er komin í gongd í nýggja felagi sínum Frem, sum í næstum fer undir at stríðast fyri uppflyting til superliguna**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Føroyski landsliðsleikarin, Jón Rói Jacobsen, er nú komin í gongd í nýggja felagi sínum, Frem, har ungi føroyski málverjin, Gunnar Nielsen, eisini telist millum leikararnar*
*Savnsmynd*

Ævintýrið hjá Jón Róa Jacobsen í danska stórfelagnum Brøndby gjørdist ongantíð tað, ið hann hevði vónað. Tað gekk striltið hjá unga havnarmanninum at vinna sær pláss á liðnum, og tí fekk Jón Rói fyri tað mesta roynt seg á eykaliðnum hjá siðvanda Keypmannahavnarfelagnum.

**Drúgvur skaði**

Tá ið so Jón Rói Jacobsen bleiv raktur av álvarsligum krossbandsskaða í knænum, var lítið at ivast í, at dagarnir hjá Jòn Róa í Brøndby mundu verða taldir. Hóast Jón Rói ikki hevði fingið høvi til at gera so nógv vart við seg í donskum fótbólti, so vóru tað tó fleiri , ið høvdu lagt merki til unga havnarmannin. Ein teirra var venjarin hjá Frem, Ebbe Skovdahl, ið er mammubeiggi venjaran hjá Brøndby, Michael Laudrup, og Skovdahl var áhugaður í at fáa Jón Róa á sítt lið.

Herfyri var Ebbe Skovdahl í Føroyum á vitjan, og stutt eftir hetta bleiv avtala gjørd millum HB, sum Jón Rói var sáttmálabundin við, og Frem um unga verjuleikaran. Jón Rói skrivaði síðani undir sáttmála við niðurflytararnar úr superliguni, og venjingin hjá teimum er eisini farin í gongd.

**Stóð seg væl í venjingardysti**

Í farnu viku leikti Frem venjingardyst ímóti superligafelagnum FC Nordsjælland, og tá taldist Jón Rói Jacobsen millum teir fyrstu ellivu hjá Frem. Jón Rói leikti í miðverjuni, og sambært heimasíðuni hjá Frem, www.bkfrem.dk, stóð føroyski landsliðsleikarin seg væl, hóast hann noyddist at verða skiftur út aftaná ein góðan tíma.

Nú Jón Rói Jacobsen tykist verða komin fyri seg aftur, hevur landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, aftur fleiri møguleikar at blanda kortini, tá ið hann skal manna verjuna á føroyska landsliðnum, og tað er bara at fegnast um, nú føroyska landsliðið skal út í truplar HM-undandystir ímóti so mætum tjóðum sum Fraklandi, Sveis og Írlandi.